# Ein dagstourur hjá



*Tað er satt manndómsbragd sum tann 80 ára gamli Martin Joensen framdi í gjár. Hann vil neyvan skírast súkklu-risi, men tey eru helst fá ið gera honum hetta bragdið eftir*

**Meðan tær stóru súkklustjørnurnar kappast í Tour de France, hevur tann skjótt 81 ára gamli havnarmaðurin Martin Joensen framt eitt annað bragd: Í gjár súkklaði hann allan vegin úr Havn til Hellurnar í einum. – Eg takki bara Gudi fyri góðu heilsuna, sigur hann**

MANNDÓMSBRAGD
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Havn/Hellur:** 90 kilometrar!
Tað er teinurin sum Martin Joensen hevði sett sær fyri at súkkla í summar á »Super Cycle« síni.

Í gjár var løtan komin til at fremja hetta stóra súkklubragdið: Áðrenn nakar varnaðist tað og um sama mundið, sum fólk møttu til arbeiðis í høvuðsstaðnum, hevði hann lagt Oyggjarvegin aftur um bak, og var hann farin at nærkast Kollfjarðardali.

Hetta gav honum mót at halda fram í góðveðrinum. Tað var ikki ov heitt og ikki ov kalt, og tað lítla lotið sum var, forðaði ikki hesum raska manni í at fara norður gjøgnum Sundalagið og teir 40 kilometrarnar niðan á Eiðisskarð.

Tað eru uttan iva tey, sum hava súkklað henda teinin áður, men fyri Martin er hetta bert endin á eini ætlan, hann hevur havt í eina tíð.

- Eg vil ikki nakað serligt fyri Martin, so riggaði bert eitt teirra.

Tað ger ikki bragd hansara minni!

## Munur á fjøllunum

Tað er ikki júst tí, at hann hevur ætlað sær at fremja nakað bragd. Men í eina tíð hevur Martin gingið og fyrireikað seg mentalt uppá ein súkklutúr av slíkari longd.

Hann hevði kannað veðurlíkindini til hósdagin, og tá tey vóru eftir vild, var bara eitt at gera: At fáa sær eina góða hvíld frammanundan, og so fara árla á føtur. Sum sagt so gjørt.

Tey sum á Grønlandsvegnum vóru farin eins tíðliga á føtur og Martin, sóu helst henda mannin setast við súkkluna og síðani leggja leiðina avstað. Ikki er vist, at tey grunaðu hvørja ætlan, ið hesin 80 ára gamli maðurin hevði.

- Eg fór frá húsum klokkan seks og legði síðani leiðina eftir Oyggjarvegnum. Og tá klokkan var farin at nærkast hálvgum níggju var eg í Kollafirði.

- Eg haldi ikki, at tað er serliga stuttligt at koyra gjøgnum ein langan tunnil. Tá er munur á at fara niðan í fjøllini eina slíka morgunstund, greiðir Martin frá.

Ferðin hevði higartil gingið sera væl, og tá klokkan var farin at nærkast hálvgum trý, var ikki langt niðan til Eiðisskarð og hægsta fjall okkara, Slættaratind. Hann var tá staddur beint omanfyri Eiðisvatn.

Hetta er ein rættiliga drúgvur teinur við mótbrekku allan vegin. Tað forðaði kortini ikki Martini at setast við súkkluna og traðka niðan hesa brekkuna, eins og einhvør annar ryndur Tour de France-súkklari.

- Nú komi eg skjótt niðan á, og so fer at rulla undan, sigur hann.

> *Nú taki eg henda túrin fyrst. Og so kann altíð henda, at eg geri ein túr aftrat onkutíð seinni*

við hesum sum so. Eg ætlaði ikki at yvirvinna nakað, men bara súkkla mær henda túrin.

- Kanska eg geri ein longri túr einaferð seinni, sigur hann, tá Sosialurin kom fram á hann á vegnum millum Eiði og Funning.

Skal hann gera tað, er helst neyðugt at fáa gearini í lagi: Væl hevur súkklan fimm gear, men ólukkutíð

## Heim til konuna

Hóast hesin túrurin av Eiði og niðan á skarðið er drúgvur, so hevði helst verið mundandi strævnari, um hann